# Reint UG

**Føroyska spælið í dystinum mikukvøldið var kanska tað besta, sum nakað føroyskt landslið hevur sýnt, og tí fær illa verið annað enn reint UG yvir alla linjuna. Kanska var tað serliga miðvøllurin, sum átti sín lut í trýstinum, sum føroyska liðið til tíðir hevði, men talan var heilt, heilt avgjørt um eitt kollektiv, sum lyfti størstu hugsandi uppgávuna í felag**

LEIKARAUMMÆLI
*Jákup Mørk*



*Súni Olsen staðfesti enn einaferð, hvussu stóran týdning hann hevur fyri liðið. Spurningurin tykist í løtuni einamest vera, hvørt hann yvir høvur hoyrir heima í føroysku kappingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### 1. Jákup Mikkelsen, KÍ (34 dystir/0 mál)
Hevði endurvunnið sær sessin sum fyrsti-málverji, men í mun til mótstøðuna, hevði hann merkisvert lítið at gera. Bert eina ferð var veruligur tørvur á eini kanón-bjarging, men ta ferðina vóru fraklendingar fyrstir at fylga upp. Tóktist annars at hava eina stabiliserandi effekt á verjuna, og var sera tryggur í tí mesta av tí, sum hann tókst við.

### 2. Súni Olsen, GÍ (15/1)
Sýndi enn einaferð eitt av bestu føroysku avrikunum. Framúrskarandi bóltførleikin ger, at tað trupla gerst so sera einfalt, og longu neyvu sendingarnar vóru eisini til staðar. Eftir steðgin var eisini sjónligt, at fraklendingar ikki vildu hava hann við í spælið, tá trýstið ofta bleiv lagt soleiðis, at okkara heldur máttu spæla mitt á ella til høgru. Tað ljóðar at fleiri føroysk feløg bjóða honum nógv fyri sáttmála til komandi ár, men spurningurin er helst, hvørt ein slíkur leikari hoyrir heima í føroysku landskappingini.

### 4. Pól Thorsteinsson, B36 (35/0)
Er framvegis fyrsta val á høgra bakki, og hesaferð prógvaði hann eisini, hví so er. Megnaði aloftast at standa rætt, tá longu bóltarnir vórðu sendir niðan, og forðaði sostatt mótstøðuni í at yvirspæla seg. Hevði fyri steðgin ávísar trupulleikar í avspælinum, men hetta betraðist munandi eftir steðgin. Ikki minst eftir reyða kortið til Viera, sum annars kom, tá Pól var kvikari á bóltinum enn franski liðskiparin.

### 5. Jón Rói Jacobsen, BK Frem (18/0)
Tykist enn ikki vera komin í fullar snúningar, men tað er nokk ikki annað enn væntandi, tá skaðasteðgurin hevur verið so drúgvur. Megnaði tó í fleiri førum at koma ímillum franska smáspælið, og steðgaði soleiðis nógvum vandastøðum, áðrenn tær gjørdust vandamiklar. Hevði tó merkisverdar trupulleikar í avspælinum, har hann eini tvær ferðir kom Føroyum í vandastøður, uttan at hetta tó kostaði.

### 6. Rógvi Jacobsen, HB (28/4)
Steðgurin á beinkinum gjørdist stuttur, og Rógvi prógvaði eisini, at valið hesaferð var rætt. Hevði leiklutin sum miðvallarin, ið skuldi stuðla álopsspælinum, og megnaði eisini hetta. Nart við eina rúgva av luftbóltum, so føroyingar hildu trýstið, og vann eisini hópin av nærdystum. Nógvu rennitúrarnir kostaðu tó nógvar kreftir, og útskiftingin tóktist tí náttúrlig.

### 7. Fróði Benjaminsen, Fram Reykjavík (28/2)
Prógvaði aftur, at hann er besti miðvallarin, sum føroyingar eiga. Fraklendingar fingu at kenna styrki hansara í nærdystunum, og fyrra gula kortið til Viera kom mest sum bara av frustratión. Er hartil eisini mest sum føst millumstøð í føroyska uppspælinum, og týdningur hansara fyri liðið fer skjótt at líkjast tí, sum Abraham Løkin hevði fyrstu altjóða fótbóltsárini.

### 8. Julian Johnsson, ÍA Akranes (58/4)
Hesaferð hevði hann ikki hitan at stríðast við, og tá er Julian gull verdur í eini slíkari uppgerð, har nærdystir á miðvøllinum hava so stóran týdning. Vann hópin av nærdystum - bæði á jørðini og í luftini - og var sostatt við til at fasthalda føroyska trýstið. Sum bóltspælari er hann tó framvegis nakað avmarkaður, men sum innpískari á miðvøllinum finst neyvan nakar betri.

### 9. Jákup á Borg, HB (35/1)
Hevði helst sín besta landsdyst í eitt gott ár ella so. Tordi og vildi bjóða av, soleiðis at framdrift eisini var í hansara síðu, og arbeiddi sum vant ótroyttiligt í verjupartinum. Fleiri ferðir var eisini vanliga bitið í innleggunum, soleiðis, sum vit vilja hava tað. Eftir reyða kortið valdi hann tó ofta at flyta seg ov langt niðan, soleiðis at hann í ov lítlan mun kom við í føroyska spælið.

### 11. Jónhard Frederiksberg, Skála (5/0)
Fekk afturval eftir avrikið í Sveis, men hevði - um gjørligt - enn truplari umstøður, nú hann var einsamallur áleypari. Stóð seg tó aftur væl, og megnaði millum annað fleiri ferðir at varðveita bóltin, tá okkara spældu langt. Kom tó ikki til nakran veruligan málmøguleika, men fekk enn einaferð prógvað, at hann veruliga hevur bitið seg fastan í hópin.

### 12. Claus Bech Jørgensen, Coventry CFC (2/0)
Við nýggja leikarunum á vonginum hava føroyingar fingið eitt nýtt álopsvápn, og hann sýndi fleiri ferðir veruligt bit og framdrift. Megnaði eisini fleiri ferðir at søkja inn í vøllin, soleiðis at yvirtal okkara her gjørdist enn sjónligari, samstundis sum pláss varð skapt fyri Súni, men í løtum tóktist tó, sum hevði hann ov góðan hug at halda bóltinum.

### 13. Óli Johannesen, TB (68/1)
Metmaðurin mundi við avrikinum hesaferð sannføra øll um, at tað eru nógvir landsdystir eftir í beinunum. Til tíðir kundi verið hóskiligt at spurt, hvørt munurin millum toppin av Premier League og føroysku 2. deild var somikið lítil, tá Óli í fleiri førum trýsti Henry av kósini móti málinum. Sum liðskipari átók hann sær eisini ein stóran stýrandi leiklut á liðnum, og seinastu løtuna var hann eisini við til at hótta franska málið, og við hepni kundi hann bæði skorað og lagt upp til føroyskt mál.

### 10. John Petersen, B36 (55/6)
Veteranurin mátti fyri fyrstu ferð í langa tíð á beinkinum, men fekk tó seinastu 25 minuttirnar á vøllinum. Hesa løtuna var hann eisini við til at halda góða føroyska trýstið, og einstakar ferðir sást gjøgnumbrotsvilji eisini í spæli hansara. Samanlagt ber tó illa til at geva eina heildarmeting, grundað á ov lítla spælitíð.

### 14. Andrew av Fløtum, Fremad Amager (14/1)
Fekk seinasta korterið á vøllinum, og sýndi í løtum, at bóltførleikin framvegis er framúr, tá tamarhald skuldi fáast á truplum bóltum. Men samanlagt var tíðin tó ov stutt til eitt veruligt skoðsmál.

### 18. Atli Danielsen, KÍ (6/0)
Fekk bert seinastu minuttirnar, og tí kann einki veruligt skoðsmál gevast. Tóktist tó deiliga óimponeraður um mótstøðuna, og sýndi í so máta, at hugburðinum er í øllum førum einki galið við, tó at hann ta einu ferðina var um at vera ov fiksur.





*– Vit høvdu ta virðing fyri teimum, sum teir høvdu uppiborið. Men vit vóru ikki bangnir, staðfesti Claus Bech Jørgensen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hesaferð var betri

**Eftir at hann í sínum fyrsta landsliðið varð avsmurdur, kundi Claus Bech Jørgensen bera høvdið nakað hægri hesaferð**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki nøkur serlig debut, sum Claus Bech Jørgensen fekk, tá hann í sínum fyrsta landsdysti var við til at fáa ein orduligan umgang í Sveis. Mikudagin eftir dystin var lagið tó øðrvísi betri, og orsøkin var eisini sjálvsøgd.

– Vit bitu í øllum førum meira frá okkum í dag, so tað var ein øðrvísi upplivingin.

*– Og tað at spæla móti slíkum stjørnum. Var tað eisini ein av orsøkunum til, at tú valdi at siga ja til landsliðsfótbólt?*

– Hetta eru sjálvandi stórar avbjóðingar. Talan er jú um leikarar í heimsflokki, men tá vit fyrst eru á vøllinum, so eru teir tíbetur eisini bara menniskju. Og tí bar eisini til hjá okkum veruliga at fara í teir.

*– Og tað sá heldur ikki út til, at tit høvdu so øgiliga stóra virðing fyri teimum?*

– Vit høvdu ta virðing fyri teimum, sum teir høvdu uppiborið. Men vit vóru ikki bangnir. Bólturin er jú rundur, og alt kann henda á einum vølli.

Fyrstu 20 minuttirnar ella so hevði føroyska liðið eisini sera gott tak á stjørnunum. Og sjálvur sigur Claus, at hetta var løtan, har føroyska liðið skuldi gjørt meira um seg.

– Eg haldi sjálvur, at vit taka teir á bóli. Høvdu vit tá megna at skorað, so kundi dysturin væl verið øðrvísi. Men hinvegin, so sigur tað seg eisini sjálvt, at vit ikki kundu halda slíkum trýsti ein heilan dyst.

– Og seinna hálvleik haldi eg eisini, at vit hava hampuligt tak á. Ikki minst eftir at Vieira verður útvístur. Men so fáa teir hatta kontra-málið, har teir sløkkja ljósið.

Og eftir avrikið mikukvøldið duldi hálvi vestmenningurin ikki, at talan hevði verið um hart stríð.

– Vit brúka eina øgiliga rúgvu av kreftum, men tað gav eisini úrslit. Ikki minst fáa vit fatur á nógvu av næstu-bóltunum, so sjálvandi vóru vit troyttir. Men tað bilar so heldur einki, staðfesti hann at enda.

# Onside

**Broyttu rangstøðureglurnar høvdu við sær, at seinna franska málið varð góðkent**

ON- ELLA OFFSIDE
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað vóru fleiri, sum vildu vera við, at seinna franska málið als ikki skuldi verðið góðkent. Hetta tí tey hildu Djibrill Cissé vera rangstaddan. Hetta er tó ikki so, og var talan um rangstøðu, so var tað í øllum førum ikki málskjúttin, sum var rangstaddur.

Niklas á Líðarenda, næstformaður í FSF, er fyrrverandi altjóða dómari, og hann greiðir soleiðis frá um reglurnar.

– Ein spælari er rangstaddur, um hann í rangstøðu fær bóltin, hevur fyrimun av síni støðu, ella órógvar spælið. Cissé var sjálvandi í rangstøðu, tá bólturin verður spældur út í síðuna, men hevur onga ávirkan á spælið, og órógvar sum so einki.

– At hann so eftirfylgjandi fær ein veldugan fyrimun, tá bólturin verður spældur inn, hevur einki við sakina at gera. Tá er talan um eina nýggja støðu, sum skal síggjast fyri seg, og hann var so ikki rangstaddur, tá bólturin verður lagdur til hansara. Var talan um rangstøðu, so skuldi tað verið, tí Giuly, sum legði upp til málið, var rangstaddur, og tað dugi eg so ikki at siga, um hann var, sigur Niklas.

*So í veruleikanum var hatta kanska eitt skúladømi um, nær tað skal veittrast og ikki?*

– Tað kanst tú gott siga. Tað er nokk heldur eingin loyna, at hatta er ein regla, sum vit ikki hava fingið gjøgnumført nóg væl enn. Uttanlands hava dómararnir lagt sera stóra áherslu á hetta, síðani broytingin varð gjøgnumførd, og tað kundu vit kanska eisini gjørt her. Vit hava kanska prioriterað øðrvísi í so máta, men tað er eingin ivi um, at hetta eisini kemur at sláa ígjøgnum her heima, sigur altso Niklas á Líðarenda at enda.




**Toyota Avensis STW TERRA D-4D (Commonrail)** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** MA 642 **KM:** 46.000
**Árgangur:** 03.04.01 **Seinast sýnaður:** 21.01.01
**Viðmerking:** El rútar framman, el spegl, fjarstýrt sentral lás, takboylar, fløguspælara.
**Kr. 172.600,-**



**Toyota Avensis STW TERRA 1,8 VVT-i** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** HN 154 **KM:** 42.000
**Árgangur:** 14.06.01 **Seinast sýnaður:** 14.06.01
**Viðmerking:** El-rútar framman, el-spegl, fjarstýrt sentrallás, takboylar, fløguspælara, klima anlegg, alu felgur.
**Kr. 160.600,-**



**Toyota Avensis TERRA 2,0 D-4D** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** FH 959 **KM:** 63.000
**Árgangur:** 08.08.01 **Seinast sýnaður:** 08.08.01
**Viðmerking:** El rútar framman, el spegl, fjarstýrt sentrallás, fløguspælara, aircondition, eyka felgur.
**Kr. 175.600,-**



**Skoda Oktavia 1,6 GLX** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** GD 930 **KM:** 61.000
**Árgangur:** 11.05.00 **Seinast sýnaður:** 23.03.04
**Viðmerking:** Sentral lás, AC, el rútar, el spegl.
**Kr. 108.600,-**



**Mitsubishi Carisima 1,9 DID** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** HV 230 **KM:** 51.000
**Árgangur:** 19.03.02 **Seinast sýnaður:** 19.03.02
**Viðmerking:** El rútar framman, el spegl, fjarstýrt sentrallás, fløguspælara, aircondition, hiti í setrum, cruisecontrol, rustviðgjørdur 15-03-02.
**Kr. 158.600,-**



**Honda CR-V 2,0 VAN** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** HK 659 **KM:** 10.000
**Árgangur:** 06.12.02 **Seinast sýnaður:** 06.12.02
**Viðmerking:** El rútar, el spegl við hita, hiti í setrunum, klima anlegg, fjarstýrt sentral lás, 15" alu felgur, píka dekk, MVG er í bilinum.
**Kr. 198.600,-** (kr. 265.600,- sum persónbilur)



**Avensis 2,0 SOL Sedan** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** SA 626 **KM:** 58.000
**Árgangur:** 21.02.00 **Seinast sýnaður:** 28.04.04
**Viðmerking:** El rútar, el spegl, fjarstýrt sentrallás, tokulyktir, tónaðar rútar aftan, MVG er í bilinum.
**Kr. 147.600,-**



**Fiat Stilo 1,6, 16V** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** FK 709 **KM:** 20.000
**Árgangur:** 29.08.02 **Seinast sýnaður:** 29.08.02
**Viðmerking:** 17" alu felgur, 15" alu við lamell dekkum, el rútar, el spegl, AC, fjarstýrt sentral lás.
**Kr. 139.000,-**



**Toyota Avensis 1,8 SOL** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** VB 551 **KM:** 46.000
**Árgangur:** 21.01.01 **Seinast sýnaður:** 21.01.01
**Viðmerking:** 15" alu felgur, el rútar og el spegl, fjarstýrt sentral lás, hiti í setrunum, ABS og BAS, klima anlegg, leður gearknøtt, leður rætt við audio stýring, fløguspælara, eyka discant hátalarar, tokulyktir, 6 air bags.
**Kr. 180.600,-**



**Toyota Camry 2,4 AUT** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** TB 245 **KM:** 44.000
**Árgangur:** 22.01.02 **Seinast sýnaður:** 22.01.02
**Viðmerking:** Tokulyktir, el rútar, el spegl við aut. innlegging, leður rætt við audio stýring, leður geraknøtt, fløguspælara, regn sensor, bakkspegl við aut. niðurblending, hiti í setrunum, 7 air bags, VSC,TRC, ABS við BAS.
**Kr. 270.600,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum á landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

TEAM85